**Vøruhúsið á Hjalla**
**sóknast eftir:**

## Goymslumanni sum skjótast

Starvið umfatar alt vanligt goymsluarbeiði á møbladeildini umframt aðrar arbeiðsuppgávur

**Vit vænta, at tú ert:**
Álítandi, røkin og hevur góð samstarvsevni. Trukkloyvi er ein fyrimunur, tó ikki ein treyt.

*Ring ella send eina umsókn sum skjótast*

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja á tlf. 342500 og spyrja eftir Finn

## Handilslærlingi til møbladeildina

Møbladeildin hevur verið limur í donsku møblaketuni Dan-Bo síðan 2000. Dan-Bo bleiv stovnað í 1974 og er í dag eitt sterkt og vældámt vørumerki í DK.

Málið hjá Dan-Bo og okkum er:
- at veita eina professionella ráðgeving
- at hava tað rættað innbúgvið til tann rætta prísin
- at vera nýskapandi
- at hava eitt persónligt forhold til okkara kundar
- at hava eitt høgt tænastustøði

Til rætta viðkomandi bjóða vit eina spennandi smásøluúbugving har tú kemur at at vera við/hava ávirkan í menningini av øllum liðum, soleiðis at vit røkka áðurnevnda mál.

Vit vænta, at tú ert: álítandi, tænastusinnað/ur og hevur kreativ evni.

Skrivlig umsókn saman við prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 11.09.06 og sendast til:

**Vøruhúsið á Hjalla**
Postboks 1019
110 Tórshavn



## MASKINMEISTARI søkist til Elfelagið SEV

Eitt starv sum maskinmeistari við elverkini í Suðuroy er leyst at søkja til setan frá umleið oktober – november 2006.

**Starvið:**
Maskinmeistaraarbeiðið umfatar rakstur og hald av elverkunum í Suðuroy, bæði sum dagarbeiði og sum vaktarbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð. Vakthavandi maskinmeistari hevur yvirvaking av og lastfor-deiling millum Vágsverkið og elverkið í Botni umframt netyvirvaking og koblingsleiðslu fyri elnetið í allari Suðuroynni.

**Elverkini í Suðuroy umfata í løtuni:**
Elverkið í Vági við trimum dieselmotorum, tilsamans 9,7 MW.
Hesir motorar eru riknir við tungolju
Elverkið í Botni, sum er eitt vatnorkuverk við tveimum turbinum upp á tilsamans 3 MW
Elverkið í Trongisvági, sum ikki koyrir dagliga, men er til at taka við einum dieselmotori upp á 2 MW.

Arbeiðsstaðið (uppmøtingarstaðið) er á Vágsverkinum, har vaktin hevur tilhald. Arbeitt verður á og út frá hesum arbeiðsstaðið til hini elverkini eftir tørvi, og fer flutningur vanliga fram við arbeiðsbili hjá SEV.

**Førleikakrøv:**
Kravt verður, at umsøkjararnir hava fulla maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. víðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv.

**Lønin:**
Starvið er lønt sambært 6. lønarflokk eftir sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.
Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan, sum verður roknaður frá próvtøkudegnum, men treytað av fakliga relevantum arbeiði síðani tá.
Byrjunar- og endalønin í 6. lønarflokki er í løtuni netto ávikavist kr. 24.999,39 og kr. 26.735,46 um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi tilsamans ávikavist kr. 3.124,92 og kr. 3.341,93 um mánaðin.

Umframt nevndu løn kann roknast við vaktargjøldum og møguliga av og á eisini úrtíðarløn.

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum verða send Elfelagnum SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi mánadagin, tann 25. september 2006.

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Palla Mortensen, verksmeistara á elverkunum í Suðuroy ella til Berg Didriksen, deildarstjóra á Maskindeildini, báðir á telefon nr. 346800.

Elfelagið SEV

Sosialurin 34180

# Havnar Bio

kall Coca-Cola




**Sprængfarlig Bombe** *FRUMSÝNING*

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 01.09 | kl. 20.30 |
| Leygardag | 02.09 | kl. 20.30 |
| Sunnudag | 03.09 | kl. 19.30 |




**Miami Vice**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 01.09 | kl. 23.00 |
| Leygardag | 02.09 | kl. 23.00 |
| Sunnudag | 03.09 | kl. 20.00 |




**Peter Pedal**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 01.09 | kl. 18.00 |
| Leygardag | 02.09 | kl. 18.00 |
| Sunnudag | 03.09 | kl. 17.00 |




**Biler** *FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 01.09 | kl. 16.00 | kl. 18.30 |
| Leygardag | 02.09 | kl. 16.00 | kl. 18.30 |
| Sunnudag | 03.09 | kl. 15.30 | kl. 18.00 |




**Snakes on a plane** *FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 01.09 | kl. 21.00 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 02.09 | kl. 21.00 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 03.09 | kl. 20.30 | kl. 22.45 |

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**
**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**

**Mentamálaráðið**
VINNU- OG MIÐNÁMSSKÚLADEILDIN

## Skrivari til verkætlan

Eitt tíðaravmarkað starv sum skrivari til verkætlan í sambandi við arbeiðið at endurskoða gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar er leyst at søkja.

Umsóknarfreistin er mánadagin 4. september 2006, kl. 16.00.

Meira fæst at vita á heimasíðu ráðsins: www.mmr.fo (undir teiginum leys størv)